# Tvey sølustøð í dag

Fótbóltssambandið boðar frá, at atgongumerkjasølan til landsdystin móti Serbia í kvøld, fer fram í Svimjihøllini og við Gundadalshøllina. Atgongumerkjasølan letur upp klokkan 16, og er kostnaðurin enn sum áður 150 kr. fyri vaksin og 20 kr. fyri børn. Á heimasíðuni leggur FSF dent á, at gjaldast má í reiðum peningi – og altso ikki við korti.



# Fabregas skaddur

Spanska landsliðið hevði ikki stórvegis trupulleikar, tá teir í gjár vunnu 6-0 á Aserbadjan í venjingardysti. Tað var tó ein dyggur smeitur fyri Spania, at liðskiparin, Cesc Fabregas, mátti av vøllinum við skaða. Hetta hendi, tá Fabregas fór harðliga um koll í brotsteiginum. Brotsspark spurdist burturúr, og hetta nýtti David Villa til at skjóta sítt triðja mál í dystinum, men Fabregas mátti altso av vøllinum at verða seymaður.

## Badmintonskúlin verður aftur

**Eins og undanfarna ár, skipar Badmintonsamband Føroyar fyri badmintonskúla í Havn, sum hesa ferð er eitt samstarv millum Badmintonsambandið og Havnar Badmintonfelag. Í ár verður spælt í ítróttarhøllini á Hálsi**

BADMINTON
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Badmintonskúlin verður frá mánadegi 29. juni til og við fríggjadag 3. juli, sum er fyrstu vikan í summarfrítíðini hjá skúlabørnunum. Skúlin er fyri børnum í aldrinum 7 til 13 ár, og dentur verður lagdur á at hava tað stuttligt, samstundis sum børnini læra og spæla nógv badminton.

Hvør dagur verður býttur upp í innan- og uttandura spæl, umframt at svimjing verður ein partur av badmintonskúlanum. Liðini verða býtt upp í vand og nýbyrjarar, so øll kunnu vera við.

Børnini koma at venja antin fyrrapart ella seinnapart alla vikuna. Morgunliðið venur frá klokkan 8.30 til 11.30, og seinnapartsliðið frá klokkan 12 til 15. Fríggjadagin 3. juli endar skúlin við einum hugna- og kappingardegi.

Fleiri góðir og væl skikkaðir venjarar eru í ár, teirra millum fyrrverandi landsliðsvenjarin, Jonas Gai.

Tilmeldingin byrjar fríggjadagin 13. juni, og nærri kunning um tilmeldingina til Badmintonskúlan 2009 verður at síggja í vikuskiftisbløðunum, umframt á heimasíðunum www.bsf.fo og www.hbf.fo.

Avmarkað pláss er á skúlanum, og tí verða plássini latin teimum, sum eru fyrst at tekna seg.



*Navnframir gestir vóru í Gundadali í gjár. Her situr Colin Calderwood (ytstur til vinstru) saman við Brian Kerry, Dean Saunders og Jákup í Stórustovu, umboðsmanni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Calderwood imponeraður

**Colin Calderwood, sum fyri nøkrum mánaðum síðani var upp á tal sum føroyskur A-landsliðsvenjari, taldist millum áskoðararnar á ovara vølli í Gundadali í gjárkvøldið. Hann var imponeraður av føroyingunum, men rósti eisini báðum liðum fyri ein stak undirhaldandi dyst**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Beint áðrenn dysturin í gjárkvøldið fór í gongd, fór næstan ein gjóstur ígjøgnum áskoðarafjøldina, sum var savnað í B36-skýlinum. Mitt í rúgvuni sóust tvey kend andlig, og beinanvegin fór fólk at teska sínamillum: »Er hatta ikki…?«

Og, jú, tað var Colin Calderwood, ið var eitt dúgliga nevnt navn í føroysku miðlunum fyri nøkrum mánaðum síðani, tá fyrst Sosialurin avdúkaði, at hann taldist millum føroysku landsliðsvenjaraevnini, og hinir miðlarnir síðani tóku eftir. Onkur teirra vildi enntá vera við, at Calderwood var á veg umborð á eitt av flogførunum hjá Atlantsflogi, men ikki fyrr enn í gjár setti hann altso fótin á føroyska jørð.

Saman við einum øðrum kendum fýri, Dean Saunders, var Calderwood millum áskoðararnar, og eftir dystin váttaði hann eisini, at hann í kvøld fer at hyggja eftir føroyska A-landsliðsvenjaranum, sum spælir sín fyrsta dyst við Brian Kerr sum venjara.

### Stórt stig fram

– Hetta var ein fínur dystur, serliga í seinna hálvleiki. Og tykkara málmaður hevði serliga í tí eina førinum eina heilt ótrúliga bjarging, segði skotin, sum helt bara henda dystin gera tað fult út vert at vera komin ein túr til Føroya.

– Teir føroysku spælararnir spældu við sera stórum stríðsanda, men eg má eisini virða russar fyri, hvussu teir royndu at spæla sín dyst. Hetta var ein stuttligur dystur at síggja.

Hóast Colin Calderwood sammetti liðini og rósti báðum, var hann fullgreiður yvir, at hann hevði verið vitni til eina sensatión:

– Tá ein tjóð, so stór sum Russland, tapir á vøllinum, óansæð hvør tað er, sum vinnur, er tað ótrúligt, tí russar megna at framleiða nógvar góðar ungar spælarar, og teir koma altíð heilt til endaspælið, segði hann.

– Men hetta er eisini eitt stórt stig fram fyri føroyskan fótbólt, so allur heiður til føroyska liðið fyri avrikið. Teir byrjaðu sera væl, og hóast tað ofta er ein vandi í at fáa mál ov tíðliga, spældu teir dystin sera væl og dugdu at standa seg í tí støðuni, at teir so tíðliga vóru komnir á odda. Teir spældu sera disiplinerað.

### Gott fyri ego

Sum nevnt, var nógv at hoyra um Colin Calderwood fyri nøkrum mánaðum síðani, tá Fótbóltssambandið leitaði eftir einum avloysara fyri Jógvan Martin Olsen sum landsliðsvenjari.

Calderwood vildi hvørki vátta ella avsanna í gjárkvøldið, at hann veruliga hevði verið upp á tal sum føroyskur A-landsliðsvenjari.

– Eg hevði akkurát mist starvið í Nottingham Forest, og tá hoyrdi eg, at tað vóru nakrar spekulatiónir. Tað er altíð deiligt at verða settur í samband við slík størv, tí tað er gott fyri títt ego, segði Calderwood eitt sindur skemtandi, uttan at fara nærri inn á evnið, men heldur at halda seg til dystin ímóti Russum og tann hjá A-landsliðnum í kvøld ímóti Serbia.

– Nú slapp eg fyrst at síggja U21-liðið hjá tykkum, sum eg havi hoyrt nógv gott um, og sjálvandi skal eg eisini síggja A-landsliðið ímóti Serbia.